# Oljufeløg koma og fara

Tað er einki óvanligt í tí, at oljufeløg koma og fara. Serstakliga ikki tá talan er um eitt nýtt og ókent øki sum tað føroyska. Hetta hevur verið gongdin í leitingini eftir olju og gassi á landgrunninum øll árini. Í byrjanini vóru nøkur 20 oljufeløg við í kanningunum men hetta talið er so minkað sohvørt. Td. fingu ikki øll feløgini, sum buðu í 1. útbjóðing loyvi, og turru brunnarnir soldaðu so aftur onkur oljufeløg frá. Mærsk, Total, Fina, Elf, Mobil, Exxon, Marathon, Phillips, Norsk Hydro og Arco eru bara nøkur av mongu feløgunum, sum hava verið við í kanningunum av undirgrundini og seinni tikið seg aftur. Amerada Hess og BG eru framvegis við men hava minkað um virksemið. Men nú tey ikki hava nakrar skyldur her meira, boringin á Brugduleiðini var tann seinasta, so má roknast við, at í hvussu er BG er við at fara heilt út úr økinum, tó at Jarðfeingi sum skilst einki hevur fingið at vita um tað sum so.

Tað hevur ljóðað, av okkurt av samanløgdu feløgunum framvegis fylgir væl við gongdini á landgrunninum, eitt nú franska Total, sum fevnir um tey trý upprunaligu fronsku og belgiska oljufeløgini, Elf, Total og Fina. Somuleiðis hevur Gas de France víst áhuga og Mærsk er eisini við at nærkast økinum aftur, nú tað hevur keypt seg inn í loyvi við markið, har Chevron er fyristøðufelag og eisini sjálvt hevur fingið tilluttað loyvi nær føroyska markinum í bretskari útbjóðing herfyri. Feløgini, sum eru mest virkin í dag á landgrunninum, eru: Statoil, BP, Shell, Eni, Anadarko, Dong, OMV, Chevron, Geysir, Atlantic Petroleum og Faroe Petroleum. Hyggja vit tí eftir oljutilgongdini við Føroyar í einum umleið 10 ára perspektivi, so er talið av oljufeløgunum, sum hava víst ans fyri økinum og hava verið við í kanningum og boringum, farið niður í helvt.






*Amerada Hess var við til at bora Brugduna í heyst. Brunnurin varð turrur men um tekningin vísir veruligu støðuna er ilt at meta um. Hetta er so tað, sum oljufeløg kunnu koma út fyri.*

# Amerada Hess framvegis við

Eitt av oljufeløgunum, sum longu tíðliga í 90-unum gjørdi eitt stórt kanningararbeiði á føroyska landgrunninum, Amerada Hess, er framvegis við í leitingini við Føroyar. Tað hevur annars ljóðað, at felagið var meira ella minni við at taka seg úr økinum. Eisini hava vit sæð, at felagið hevur minkað heilt nógv um sítt virksemi í Norðsjónum og sum heild í Europa.

Tá farið varð undir at bora fyrstu brunnarnar á landgrunninum var Amerada Hess eitt tað mest virkna oljufelagið og var tað fyristøðufelag, tá 1. leitirunda varð veruleiki. Síðani felagið boraði Marjun-brunnin, sum vísti seg at goyma nógva olju men á so stórum dýpi, at torført er at hava við hesa oljuna at gera, er felagið vorðið meira og meira ósjónligt her. Herfyri lat felagið aftur rúmligu og snotuligu skrivstovuna í Havn fyri tó at fáa innivist í nýggju hølunum hjá Atlantic Petroleum.

Stjórin í føroysku deildini av felagnum, Ben Arabo er fluttur til London at arbeiða fyri felagið. Vit hava spurt tíðindastjóran hjá felagnum, um hetta merkir, at Amerada Hess er við at siga farvæl við Føroyar. Andy Mitchell sigur við blaðið, at Atlantsmótið heldur fram at vera eitt av leitiøkjunum hjá felagnum. –Vit arbeiða framvegis við at evaluera hetta økið, soleiðis at vit enn ikki kunnu siga, um vit fara at bora aftur sum fyristøðufelag á Atlantsmótinum komandi árini. Hóast báðir brunnarnir vit hava borað á føroyskum øki hava givið okkum áhugaverdar jarðfrøðiligar upplýsingar, so hava vit enn ikki funnið kolvetni í rakstrarverdum nøgdum. Vit hava tí í løtuni ongar ítøkiligar ætlanir um víðari virksemi í føroyska økinum, men Hess fer at halda fram við at fylgja við gongdini á føroyska landgrunninum við áhuga.




# Partabrøv hækka enn

*Vika 46*

**MARKNAÐARRÁK**

Lækkingin í partabrævamarknaðinum, vit væntaðu fyri tveimum vikum síðani, gjørdist sera lítil. Partabrøv lækkaðu einans um 2%, og tey eru hækkaði meir enn tað aftur. Partabrævamarknaðirnir flest alla staðni halda sostatt á at hækka, eins og teir hava gjørt nærum út í eitt síðan juli. Hendan gongdin er ikki minst stuðlað av, at roknskapirnir fyri 3. ársfjórðing hava verið sera góðir, og nógv betur enn væntað. Í miðal eru inntøkurnar hjá virkjunum í USA 23% hægri enn 3. ársfjórðing í fjør. Lægri oljuprísur ger eisini sítt til, at partabrøvini hækka. Tó so, evropisk partabrøv eru hækkað 16% seinastu fýra mánaðirnar, og ein lítil rætting niðureftir er enn væntandi.

### Lánsbrævarentur støðugar

Longu lánsbrævarenturnar eru á sama støði sum í síðstu viku. 10-ára rentan er 3,81%. Sostatt er hon á leið 0,20%-stig lægri enn 1-árs rentan. Tað er rættiliga óvanligt, at mesta rentan fæst við 1-ára lánsbrævið.

### Álit er á partabrævamarknaðin

Tað er ein sannroynd, at roknskapirnir m.a. úr USA og Norðurlondum, ið eru kunngjørdir fyri 3. ársfjórðing, sum heild hava verið góðir. Hetta staðfestir meting okkara um, at tað stendur væl til hjá virkjum á leiðandi partabrævamarknaðunum. Íleggjarar eru eisini bjartskygdir um komandi partabræva-gongdina, m.a í USA. Hetta staðfestir lutfallið millum mongdina av handlaðum Call- og Put-optiónum. Lutfallið staðfestur, at talið av teimum, sum í seinastuni hava tryggjað sær rættin at keypa partabrøv komandi tíðina, er størri enn talið á teimum, ið hava tryggjað sær rættin at selja partabrøv. Álitið á partabrøvini er sostatt til staðar.

### Hesa vikuna

Hendan vikan verður hendingarík á marknaðunum. Í løtuni leggja íleggjarar stóran dent á prísvøkstur. Hesa vikuna verða millum annað prísvøksturin báðu megin Atlantshav, umframt BTÚ í Evropa, kunngjørd. Um prísvøksturin verður hægri enn væntað, lækka bæði láns- og partabrøv væntandi.

**Donsk 10-ára renta**




**Vísital fyri norrøn partabrøv**




**Gjaldoyru**

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| USD | 582,36 | -0,6% | ↓ |
| JPY | 4,93 | -0,5% | ↓ |
| GBP | 1.107,24 | -0,4% | ↓ |
| NOK | 90,86 | 0,7% | ↑ |
| SEK | 82,03 | 0,8% | ↑ |

**Virðisbrøv**

| Norrøn | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 98,57 | 0,1% | ↑ |
| Norrøn Partabrøv | 121,50 | 2,3% | ↑ |
| **VMF** | **Kursur** | **+/- %** | |
| Atlantic Petroleum | 589,00 | -0,5% | ↓ |
| KB Trygg Eurostoxx | 107,42 | 1,0% | ↑ |

*Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan. Myndirnar vísa gongdina seinastu 3 mánaðirnar.*